# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Saddam Hussein var ein hetja, og tað var mær ein heiður at arbeiða saman við honum*

*(Tariq Aziz)*

**STUTT SAGT**

## Barnamorð

Fólk í Brasil eru skelkað, eftir at líkið av einari átjan mánaðar gamlari smágentu varð funnið inni í einari kirkju har suðuri í landinum um vikuskiftið. Ein talskvinna hjá løgregluni hevur greitt tíðindafólkum frá, at tað tóktist, sum drápsmaðurin hevði misbrúkt gentuna kynsliga, áðrenn hann hevði kvalt hana. Gentan var í kirkju saman við foreldrunum. Tey høvdu koyrt gentuna í eitt rúm, har umleið 20 onnur børn vóru, men tá tey komu aftur eftir henni, var hon horvin. Løtu seinni varð hon funnin deyð inni í kirkjuni.

## Bumbu ígjøgnum takið

Níggju sivilfólk doyðu, tá eitt amerikanskt flogfar slepti einari bumbu niður yvir eini hús í Afghanistan í gjár. Amerikanska herleiðslan sigur, at flogfarið slepti bumbuni, eftir at onkur hevði skotið eina rakett eftir einari amerikanskari herstøð. Afghanskir embætismenn siga, at tey níggju, sum doyðu av bumbuni, vóru húsfólk, og at talan var um fýra ættarlið. Hetta er annar tilburðurin av hesum slagnum teir seinastu dagarnar. Sunnudagin doyðu fimm kvinnur og fýra børn, tá ein amerikonsk bumba raktu hús teirra. Tað fekk Hamid Karzai, forseta at siga, at slíkir tilburðir bøta ikki um umdømið hjá NATO-hermonnunum í Afghanistan.

## Bleiv ikki myrd

Dómarin, sum seinastu tíðina hevur kannað tilburðin, tá Diana prinsessa doyði, segði í hægsrarætti í London í gjár, at hon hevur ikki funnið minsta tekin um, at Diana bleiv myrd. Orð dómarans vóru ætlað at svara Mohamed al Fayed, sum hevur kravt eina nýggja kanning av, hvat veruliga hendi, tá sonur hansara, Dodi al Fayed, og Diana prinsessa doyðu. Dómarin segði í einari hoyring í hægstarætti, at tað er eingin orsøk til at halda fram við kanningunum ella at leggja málið fyri eitt nevningating, tí har er einki hjá nevningunum at taka støðu til, segði hon.

## Felags leiðslu

Býráðið í Klaksvík heldur fast um kravið um, at teir báðir fólkaskúlarnir í býnum, skúlin á Ziskatrøð og skúlin við Ósánna, skulu hava felags leiðslu. Um nakrar vikur er eingin leiðsla í skúlanum á Ziskatrøð, og hetta høvið eiga vit at brúka til at fáa felags leiðslu á báðum skúlunum, sigur Jákup Mikkelsen, varaborgarstjóri, við Útvarpið. Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, hevur fyrr sagt, at kommunan bíðar eftir mentamálaráðnum.

## Zink í Grønlandi

Áhugin fyri at sleppa at leita eftir zinki í Grønlandi er stórur. Í hvussu er veit CNN at siga, at eitt avstralskt felag hevur goldið 92 mió. krónur fyri at sleppa at leita eftir zainki við Citronen-fjørðin í Landnyrðingsgrønlandi. Sambært CNN væntar avstralska felagið, at 17 mió. tons av zinkmálmi eru í økinum við fjørðin. Eitt annað felag hevur í løtuni rættindini til at vinna zink við Citronen-fjørðin, men tað avstralska hevur nú keypt rættindini.

# Rósti Saddam Hussein

**Tað kom óvart á fleiri, at fyrrverandi irakski varaforsætisráðharrin, Tariq Aziz, rósti Saddam Hussein**



*Tariq Aziz var fyrst uttanríkisráðharri og seinni varaforsætisráðharri í Irak*

– Eg hevði tann heiður at arbeiða í fyrrverandi stýrinum og saman við hetjuni Saddam Hussein, segði Tariq Aziz, tá hann var til avhoyringar í irakska hægstarætti í gjár. Fyrrverandi varaforsætisráðharrin og uttanríkisráðharrin avsannaði eisini, at fyrrverandi stýrið í Bagdad hevði skipað fyri nøkrum hópdrápi.

Tað var týðiligt, at orðalagið hjá Tariq Aziz kom óvart á dómararnar, og tilburðurin gav eisini eina heilt aðra mynd av fyrrverandi ráðharranum, sum í altjóða eygum bleiv mettur sum ein av teimum hóvligu iraksku leiðarunum. Aziz var tann einasti kristni ráðharrin í fyrrverandi stýrinum.

– Saddam var hetjan aftan fyri iraksku eindina og landsins sjálvræði, og tað var mær ein heiður at arbeiða saman við honum, segði Taeiq Aziz í rættinum. Dómarin bað hann tiga og ávaraði um, at orðini kundu verða vend ímóti honum seinni.

Tann 71 ára gamli Tariq Aziz gav seg yvir til amerikonsku herdeildirnar í apríl í 2003, og síðani hevur hann sitið í varðhaldi Camp Cooper-fongslinum nærhendisd altjóða floghavnini í Bagdad.

# Kann vera al-Qaeda

**Fimm starvsfólk á bretsku sendistovuni í Ethiopia eru burturflutt. Illgruni er um, at tað kann vera al-Qaeda, sum hevur burturflutt tey**

Teir báðir bilarnir, sum tey fimm bretsku starvsfólkini vóru í, tá tey vórðu burturflutt, vórðu funnir í gjár. Teir vóru gjøgnumgataðir av kúlum, men serliga merkisvert var, at viðførið, fartelefronir og annað lá eftir í bilunum. Myndugleikarnir eru tí komnir til ta niðurstøðu, at tað vóru ikki vanligir tjóvar, sum tóku starvsfólkini, men at talan heldur er um eitt politiskt átak.

Bretska blaðið The Independent skrivar, at bretska stjórnin hevur biðið ethiopisku myndugleikarnar um loyvi at senda servandar hermenn um markið úr Kenya at leita eftir teimum horvnu sendistovufólkunum.

Teir bretsku hermenninir í Kenya hjálptu fyrr í ár kenyansku myndugleikunum at taka limir í al-Qaeda, sum flýddu úr Somalia. Bretskir fjølmiðlar stúra nú fyri, at burturflytingin í Ethiopia kann vera hevnd fyri tað.

# Ikki sjálvmorð

**Russiskir fjølmiðlar vilja vera við, at atfinningarsamar greinar hava kostað enn einum tíðindafólki lívið**

Fríggjadagin doyði russiski blaðmaðurin Ivan Safronov av løstunum, sum hann fekk, tá hann datt út ígjøgnum eitt vindeyga á fimtu hædd. Myndugleikarnir siga, at Ivan Safronov leyp út ígjøgnum vindeygað, og at talan sostatt var um sjálvmorð.

Men russisku fjølmiðlarnir hava ilt við at góðtaka ta frágreiðingina.

– Myndugleikarnir umhugsa ikki aðrar møguleikar enn sjálvmorð, men øll, sum kendu Ivan Safronov, siga, at hann tók ikki lívið av sær, skrivar blaðið Kommersant, sum Ivan Safronov arbeiddi hjá. Starvsfelagar og skyldfólk hansara, at hann hevði tað gott, og at tey duga ikki at síggja nakra orsøk til, at hann skuldi beina fyri sær.

Ivan Safronov var yvirmaður í russiska herinum, áðrenn hann gjørdist blaðmaður á Kommersant í 1997. Hann skrivaði fleiri atfinningarsamar greinar og var ikki høgt í metum hjá myndugleikunum, skrivar Reuters úr Moskva.